# Mín besta uppskrift

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos



**UPPSKRIFT:** Maria Reynstind

## Gummusa sjokomuffins

| | |
|---|---|
| 250 g | av sukri |
| 2 | egg |
| 225 g | av mjøli |
| 2 tsk | av vaniljusukuri |
| 1,5 spsk | av kakao |
| 2 tsk | av bakipulvri |
| 1,75 dl | av mjólk |
| 150 g | av margarini |
| | *Glaring:* |
| 100 g | av myrkri sjokolátu |
| | eitt sindur av róma |

Set ovnin á 200 hitastig við yvir og undirhita, ella 180 hitastig við hitaluft.

Smeltað margarinið. Píska egg og sukur væl. Blanda mjøl, vaniljusukur, kakao og bakipulvur saman. Koyr í eggjablandið. Pískað mjólk og at enda margarinið í.

Koyr deiggið í 12 stórar muffinsformar, og set í ovnin í umleið 25 min.

Koyr glaring omaná, og njót tær afturvið einum koppi av te.

Vælgagnist!

**MÍN BESTA UPPSKRIFT**
er nýggjur teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
**mrk. uppskrift**

Ella til post@sosialurin.fo.

Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**



Thomas Dam búnýti

TÓRSHAVN
Niels Finsensgøta 18
tel. 36 30 00

SALTANGARÁ
Heiðavegur 56
tel. 44 76 04





# Mest tos í triðja Stieg Larson filminum

TRIÐJI OG SEINASTI FILMUR UM **LISBETH SALANDER** ER NÚ KOMIN Á SKÍGGJAN

★★★☆☆☆

**UMMÆLI**

**Inna Törnroos**
inna@sosialurin.fo

»Luftkastellet der blev sprængt« er beinleiðis framhald frá seinasta filminum »Pigen der legede med ilden«. Tá kom Lisbeth illa fyri í endanum av filminum.

Av somu orsøk er stórur partur av hesum filmi á sjúkrahúsi og í rættarsalinum.

Nakrar actionscenur eru, men mest er hetta ein tosifilmur við nógvum eldri sjónleikarum.

Lisbeth Salander (Noomi Rapace) trøllbindur, og er tað ein sonn frøi at síggja, hvussu hon, so at siga, altíð hevur tak á støðunum, hon rótar seg út í. Mikael Blomqvist (Michael Nykvist) hevur eisini ein stóran leiklut, men tíanverri eru Listbeth og Mikael sjáldan í sama rúmi.

Spurningurin er, um hesin filmurin ikki líka so gott hevði kunnað verið tann sjónvarpsfilmur, hann upprunaliga var ætlaður at verða.

Hann hevur ikki líka nógvar actionscenur sum fyrru filmarnir, og søgan er ikki líka grípandi. Stundum kendist filmurin eitt sindur langdrigin.

Her skal eisini nevnast, at ljóðið var út av lagi vánaligt seinasta tíman.

Hóast hesin filmur ikki er líka góður sum teir fyrru, so vil eg tó mæla til at síggja hann, eftirsum hann dregur samanum søguna hjá Salander. Ein fer eisini úr biografinum við einari góðari kenslu av, at rættvísi altíð sigrar at enda.

